FS Vágar-KÍ:

# Hava ongantíð vunnið á heimavølli

**FS Vágar hevur bara fingið eitt stig í Miðvági í ár, og hagtølini hjá KÍ siga næstan, at tað hesa ferð ikki eigur at eydnast teimum at fáa fulla úrtøku**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*




*Enn hevur KÍ ikki vunnið tveir dystir á rað, men hinvegin hava vágamenn ongan tíð vunnið á heimavølli í ár*

Tað hevur als ikki hilnast soleiðis hjá FS Vágum, sum teir undan kappingarbyrjan høvdu vónað. Teir hildu seg hava manning til pláss í miðjuni. Nú tað resta trý umfør, er FS Vágar næstaftast. Sannlíkið tykist stórt fyri, at teir í endaspæli mugu stríðast fyri at varðveita plássið í bestu deildini. FS Vágar hevur ongantíð megnað at vinna á heimavøllinum í Miðvági í ár, og teir hava bara fingið stig á heimavølli í javnleikinum ímóti GÍ (2–2).

Við stórsigrinum á heimavølli ímóti Skála fekk KÍ snarað málmuninum, soleiðis at hann nú er positivur. Høvuðseyðkennið hjá klaksvíkingum hevur í ár verið, at teir hava verið óstøðugir. Higartil í ár hava teir ongantíð megnað at vinna tveir landskappingardystir á rað. Spurningurin er nú, um teir hesa ferð fara at megna at vinna øll stigini, eftir at teir síðsta sunnudag vunnu.

### Ódrúgvir útlendingar

Ímóti B36 helt FS Vágar leingi tørn, men so góvu teir B36 eitt mál, og hóast teir megnaðu at javna, so taptu teir kortini 4–1. Síðsta sunnudag var bara ein av útlendingunum, Clayton Soares, førur fyri at vera við frá byrjan. Hesa ferð verður í hvussu so er Silva Braga, sum var skaddur í fótinum seinast, ímillum teir fyrstu ellivu. Hann hevur vant í vikuni, og hann er førur fyri at spæla.

Jóhannis Joensen, sum hevur verið plágaður av liðbandsskaða í knænum síðani B68 var í Miðvági, er farin aftur at venja, men tað verður ikki roknað við, at hann verður á liðnum ímóti KÍ. Kim Poulsen hevur leingi verið plágaður av skaða í lærkrikanum, og hann verður neyvan við ímóti KÍ.

Ovi Nysted verður ikki á KÍ liðnum í morgin. Fyri aðru ferð síðani summarsteðgin er hann leikbannaður. Síðani leikbannið ímóti B68 hevur hann spælt tvær ferðir, og hann hevur fingið gult kort báðu ferðirnar.

Eyðun Klakstein fekk ein løst undir venjing mánakvøldið. Tað tóktist vera heilt álvarsamt, og Eyðun hevur ikki vant síðani. Men talan hevur verið um framgongd, og fyrrapartin í gjár var tað ikki heilt útilokað, at hann kanska verður við í morgin.

Í sjeynda umfarinum vann KÍ 2–0 á FS Vágum í Klaksvík. Vágamenn mettu eftir ta uppgerðina, at KÍ mundi vera veikasta liðið, sum teir høvdu spælt ímóti. Spuringurin er nú, um teir fara at megna at fáa øll stigini frá KÍ og harvið fara at vinna fyri fyrstu ferð á heimavølli í ár. Einasti FS Vágar sigurin á árinum er tann, sum teir í sætta umfarinum vunnu á Toftum.

Um KÍ ikki megnar at vinna hesa ferð, so verður framvegis møguleiki fyri, at hetta verður kappingarárið, tá ið KÍ ikki megnaði at vinna tvær ferðir á rað.

# Pettersson er á veg úr FCK

**Ein av kappingarneytunum hjá Toda Jónsson tykist vera á veg burtur úr Keypmannahavn og aftur um Oyrasund**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*
*Joannes@sosialurin.fo*

FCK skal seinnapartin í dag aftur í eldin. Talan er um heimadyst ímóti Herfølge, og setningurin hjá FCK verður at reisa seg og at fáa trý stig, eftir at úrtøkan tvær tær seinastu ferðirnar bara hevur verið eitt stig hvørja ferð.

Á heimasíðu sínari – todi.fo – sigur Todi Jónsson, at tað kendist sum vónbrot hjá honum, at tað mikukvøldið í Viborg ikki var pláss fyri honum millum ellivu teir fyrstu. Todi helt seg ikki hava spælt seg av liðnum. Um tað verður pláss fyri honum í dag, ella um hann aftur verður noyddur at sita á beinkinum, meðan Álvaro Santos fær møguleikan, var ikki greitt í gjár.

Tað er heldur ikki greitt enn, men í donsku miðlunum hevur teir báðar seinastu dagarnar verið nevnt, at Jörgen Pettersson kanska er á veg burtur úr FCK. Hann hevur síðani á sumri í fjør verið í felagnum. Upprunaliga varð hann roknaður sum hóttan móti álopsplássinum hjá Toda Jónsson, men hesar seinastu mánaðirnar hevur hann meiri verið mettur sum framrættaður miðvallari.

Tíðindini eru komin fram í svenska Kvällposten, sum veit at siga, at svenski FCK spælarin hevur selt húsini í Lyngby, og at hann hevur keypt hús í Skåne, sum familjan ger seg klára at flyta í.

Blaðið heldur seg eisini vita, at Jörgen Pettersson er á veg aftur til Malmö FF, sum hann áður hevur spælt fyri, og har hann hevur skorað nógv mál.

Jörgen Pettersson hevur ikki verið í fimtan manna hópinum hjá FCK tríggjar tær seinastu ferðirnar, og hann dylur ikki fyri donskum miðlum, at hann er misnøgdur við støðuna, sum hon er:

– Eg eri væl fyri at spæla, men eg sleppi ikki framat. Tað er frustrerandi, og eg havi sagt venjaranum, at eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at vera í FCK, um eg ikki sleppi at spæla. Eg eri opin fyri øllum, og hóast sáttmálaskeiðið hjá mær her í FCK ikki verður liðugt fyrrenn í 2005, so eri eg opin fyri at flyta, tá ið tað á nýggjárinum aftur verður møguleiki at skriva sáttmálar.

FCK venjarin, Hans Backe, hevur ongar viðmerkingar til tað, sum spælarin og pressan vita at siga.

Jörgen Pettersson flutti á sumri í 2002 úr týska FC Kaiserlautern og til FCK. Tá varð hann mettur sum maðurin, ið fór at verða mest støðugi málskjúttin í FCK. Síðani hevur hann verið nógv skaddur, og tað kann ikki annað enn staðfestast, at hann ongantíð hevur megnað at troðka seg framum Toda Jónsson í røðini av framrættaðum FCK spælarum.

Skála-VB:

# Nógv ivamál eru á Skála

*Skal Skála hava nakran kjans at halda sessinum, so er tað nú allar seinasta útkall at fáa stig*

**Vágbingar eru væl fyri, og teir kenna seg ikki tryggari enn so í bestu deildini, enn at tað framvegis er týdningarmikið at skava stig saman**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



Hjá Skála er tað fram ímóti at vera allar síðsti møguleikin. Um liðið skal hava rætt at spæla triðja árið á rað í bestu deildini, so skulu teir fáa stig og helst vinna, tá ið VB í morgin fer at vitja á Skála.

Síðsta sunnudag legði Skála rygg til størsta tapið av øllum í hesum kappingarárinum. Tað kunnu teir liva við, um tað eydnast teimum at vinna í morgin. Men fyritreytirnar kundu havt verið betri, enn tær tóktust at vera í gjár:

– Pauli G. Hansen noyddist at taka seg aftur í steðginum í Klaksvík. Vit rokna við, at hann verður við ímóti VB. Men tað eru tríggir spælarar, sum eru rættuliga ivasamir. Teir eru Bogi Gregersen, Arnhold Berg og Sveinur Justinussen, verður sagt av Skála.

Sveinur fekk skaða í annað knæið í venjingardysti í hondbólti mikukvøldið, tá ið St.Í.F. spældi ímóti Kyndli. Arnhold Berg er eisini plágaður av knæskaða, og Bogi Gregersen hevur trupulleikar við liðbondunum í øðrum fótinum.

Á plusssíðuni telur tað, at Eugen Voda, sum leingi hevur verið skaddur, aftur er farin av venja. Kanska verður hann í Skála málinum í morgin.

### Alt væl

Heilt víst er tað, at Bjarni Johansen aftur í morgin fer at verja VB málið. Vágbingar hava allar spælararnar tøkar. Mortan úr Hørg og Palli Augustinussen hava ikki vant saman við hinum síðstu vikurnar, tí teir hava arbeitt norðanfjørðs.

VB fekk ikki høvi at royna seg í meiri enn eitt korter síðsta sunnudag. Ætlanin segðist vera, at dysturin ímóti GÍ skuldi verða spældur síðsta hóskvøld, men tá roknaði veðurmaðurin aftur við fitt av vindi, so tað kom ongantíð har til, at gøtumenn fóru suður. Nú verður roknað við, at dysturin kanska verður hóskvøldið í næstu viku.

Kenna tit tykkum at hava tryggjað tykkum ímóti niðurflyting?

– Vit hava framvegis tólv stig at spæla um, og vit leingjast eftir at sleppa upp í part aftur, tí nú eru tríggjar vikur síðani, at vit síðst spældu landskappingardyst. Hjá okkum ræður um at fáa so nógv stig, sum tað ber til. Vit vita ikki, hvat FS Vágar kann gera við hini liðini, men fyri støðuna hjá okkum hevur tað stóran týdning, at vit vinna hvørja ferð og ikki minst, at vit fáa fult á Skála í morgin, sigur Bjarni Johansen, veteranurin í VB málinum.

Í sjeynda umfarinum vann VB á heimavølli 2–0 á Skála.

# Vikuskifti

Nr. 178 • leygardagur • 20. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dalai Lama á Harvard

Mánadagin vitjaði heimskendi Dalai Lama lærda háskúlan Harvard í USA. Hans Kárason Mikkelsen var til staðar

**Lesið síðu 6 og 7**



*Sofía (t.v.) var heppin, tá hon datt á rennifjøl sínari. Hóast hon ikki var í hjálmi, fekk hon bert smávegis skursl í pannuna. Kortini blivu hon og vinkona hennara, Jastrið, so kløkkar, at tær beinanvegin fóru til verka at savna pening fyri hjálmar*

# Nú fara vit altíð at nýta hjálm

Betur er at vera fyrivarin enn eftirsnarin, sigur orðatakið. Men brent barn ræðist eld, og oftas er hetta seinna tað, ið fær okkum at taka tey fyrivarni, sum eru neyðug

BØRN OG SPÆL
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Á Helnabrekku í Klaksvík búgva tvær góðar vinkonur, sum eita Sofía og Jastrið.

Síðani tær byrjaðu í 1. flokki, hava tær spælt saman nærum hvønn dag. Nú eru tær 10 og 11 ára gamlar og ganga í 5. flokki í skúlanum á Ziskatrøð.

Teimum dámar væl ítrótt. Tær spæla fótbólt við KÍ og flogbólt við Mjølnir.

Í eina tíð hevur skateboard ella rennifjøl, sum tað eitur á føroyskum, verið eitt av teirra frítíðarítrivum.

### Góð ráð dýr

Beint omanfyri, har tær búgva, eru nýggju íbúðirnar hjá teimum eldru. Har er alt nýtt og í góðum standi, eisini vegirnir og brekkurnar á økinum, sum eru nýasfalteraðar.

Á brekkuni oman móti Helnabrekku liggur væl fyri at koyra á rennifjøl, og tað hava tær báðar gjørt nógv av í summar.

Men ein dagin datt 10 ára gamla Sofía á rennifjøl sínari. Tíbetur fekk hon ongan skaða, bert smávegis skursl á pannuna.

Kortini fingu hon og vinkona hennara ein slíkan hvøkk, at tær settu sær fyri, at hereftir skuldu tær altíð nýta hjálm.

Men hvaðani skuldi peningurin koma?

### Uppfinnsamar gentur

Jú, tær vóru ikki ráðaleysar og hildu, at tær skuldu fara at royna at vinna nakað av peningi við at selja blómur.

Tær fóru í urtagarðin hjá Sofíu og teimum og hentaðu allar tær vakrastu blómurnar, tær funnu.

Síðani fóru tær hús av húsi at selja blómur, so tær kundu keypa sær hjálmar. Tað gekk væl at selja, og fólk vóru bæði blíð og týð - og meiri enn so; onkustaðni fóru blómurnar fyri høgan prís.

Men tá foreldrini sóu, hvat genturnar høvdust at, varð blómusølan steðgað við brestin. Tey søgdu, at peningin, sum vantaði í, skuldu tær fáa frá teimum.

Tað gingu nakrir dagar, áðrenn tað eydnaðist teimum at fáa júst teir hjálmarnar, sum tær vildu hava. Tær skoyttu ikki um hvat sum helst, tí smart má tað jú eisini vera.

Nú eru hesar báðar skilagóðu genturnar, eydnusamir eigarar av hvør sínum svørtum hjálmi, ið er júst sum hjá teimum professionellu.

Og var ikki onkur, sum segði, at hjálmur er cool...